ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Eg haldi eisini, at vit brúka ov nógvar kreftir upp á dómararnar«*

*Hans Fróði Jensen, Fram*

# Taptu báðar dystirnar

**Føroysku hondbóltskvinnurnar stóðu seg bæði minni væl og væl, tá tær vitjaðu í Íslandi um vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki við mýkindum, at føroysku hondbóltskvinnurnar lendu í Reykjavík fríggjadagin. Fáar tímar eftir lendingina, stóð landsdystur móti Íslandi á skránni, og talan gjørdist her um veruligt sorl. Ikki minni enn 43-11 gjørdist sigurin hjá Íslandi hendan fyrsta dystin.

Í so máta gekst betri leygardagin, tá nýggjur dystur varð spældur. Eisini hesa ferð vann Ísland, men sigurin var hesa ferð 27-21.

### Av flogvølli í høllina

Sum skilst, so var stórtapið í fyrra dystinum eitt úrslit av, at spælararnir ikki høvdu ta stóru tíðina at umstilla seg til dystin. Tær, sum spæla í Føroyum, høvdu eina lítla venjing, beint eftir at flogfarið hevði sett seg, og síðani varð bíðað eftir útisetunum, sum komu við øðrum flogfari.

– Hesar seinnu komu at kalla beint úr flogfarinum til dystin, og yvir høvur kundu vit illa vænta nakað gott úrslit í hesum dystinum, sigur Sophus Dal Christiansen, sum saman við Flemming Raben tekur sær av føroyska liðnum.

– Vit vóru tó samd um, at hóast vánaligar fortreytir, so skal hugburðurin vera øðrvísi, og tað var hann tíbetur eisini til seinna dystin. Hendan taptu vit so eisini, men vit hildu sera væl fatur í teimum. Spælararnir offraðu seg veruliga, og tí gjørdist talan um eitt munandi betri úrslit, sigur Sophus.

### Challenge fyri framman

Sunnudagin spældi føroyska liðið eisini venjingardyst móti Haukum í Reykjavík. Til tann dystin vóru útisetarnir á føroyska liðnum farnar til Danmarkar, og tað gjørdi føroyska liðið veikari. Dysturin endaði við fimmm-mála sigri til Haukar, sum liggur miðskeiðis í fremstu íslendsku deildini.

Hjá føroyska liðnum er hetta partur í fyrireikinunum til Challenge-Trophy kappingina, sum verður í apríl mánaði 2008. Enn er ikki greitt, hvar hendan verður, men HSF hevur boðað frá, at tey arbeiða við at fáa kappingina til Føroya.

Ætlandi fær landsliðið eisini nakrar venjingardystir afturat komandi árið. Enn er mótstøðan ikki greið, men sum skilst skal talan verða um dyst í paríl mánaði.

Ísland fer nú at spæla EM-undankapping í Ungarn. Her skulu tær spæla móti Ungarn, Italia og Portugal.

| | |
|---|---|
| **Úrslitini** | |
| Kvinnur | |
| Ísland-Føroyar | 43-11 |
| Ísland-Føroyar | 27-21 |
| **Menn** | |
| Luksemburg-Føroyar | 32-23 (15-13) |
| Luksemburg-Føroyar | 41-29 (18-18) |

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Pausurnar verða revsaðar

**Fyrri hálvleikur hjá føroyska manslandsliðnum gekk sera væl í báðum dystunum móti Luksemburg, men botnstøðið var ov lágt, og so varð liðið revsað hart**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tvey greið tap móti Luksemburg, so vóru føroysku landsliðsvenjaranrir ikki so heilt ónøgdir um ferðina hjá manslandsliðnum til Luksemburg.

Birgir Hansen, sum saman við Kára Nielsen venur liðið, helt í øllum førum, at teir høvdu fingið rímiliga nógv burtur úr teimum báðum dystunum.



*Hóast tvey greið tap, so vóru føroysku landsliðsvenjararnir als ikki ónøgdir um avrikið í Luksemburg*

### Verða trýstir

Stóri munurin millum liðini var sambært Birgir, at spælararnir hjá Luksemburg megnaðu at halda høvdið kalt allan dystin at kalla.

– Vit møta einum liði, sum hóskar væl til okkum. Eg vil ikki siga, at okkara eru so nógv verri, sum úrslitið bendir á, men fyrst og fremst, so megna teir at trýsta okkum í samfullar 60 minuttir, og tað eru okkara ikki vanir við, sigur Birgir.

– Í báðum dystunum hanga vit sera væl í teimum. Fyrra dystin skrædnar tó seinastu 10 minuttirnar, tá støðan broytist frá 18-17 til 29-20, og sum so er søgan ikki heilt ólík í seinna dystinum. Tá spæla vit ein fínan fyrra hálvleik, men tá vit so byrja seinna hálvleik við at fáa tríggjar útvísingar, sleppa teir veruliga avstað.

Men er tað ikki tekin um, at fysiski parturin hjá føroyska liðnum ikki er nóg sterkur?

– Tað haldi eg ikki. Tá tað ræður um at renna, fylgja vit væl við, men vit megna bara ikki at halda høvdinum kalt alla tíðina. Og so eru eisini nakrir lutir, sum vit enn mangla í okkara spæli. Eitt nú skulu menn verða munandi betri í ein móti einum støðum.

### Hava 14 mánaðir eftir

Dystirnir móti Luksemburg vóru bara fyrsta stigið á leiðini, nú føroyska liðið fyrireikar seg til HM-undankappingina í januar 2008.

Og Birgir leggur eisini dent á, at teir nú skulu arbeiða miðvíst fram móti stóra málinum.

– Enn er ikki heilt greitt, hvørjir dystir liggja fyri framman. Ísland hevur tó játtað at koma hendan vegin við einum liga-landsliði ella U-21 landsliði, og teir dystirnir verða væntandi um mánaðarskifti, mars-apríl. Hartil vóna vit at vera partur av eini fýralanda-kapping um eitt ár ella so.

– Men hjá okkum er fyrst og fremst at leggja eina miðvísa ætlan, hvussu vit best fáa ment einstøku spælararnar. Ein partur av hesum verður at tosa við ymsu venjararnar kring landið, soleiðis at hesir eisini aktivt kunnu vera við til at menna landsliðið. Har eru sjálvandi fleiri lutir, sum eiga at betrast, men nógvir av teimum vit røkka, um bara arbeiðið við hesum er nóg miðvíst. Og tað verður hetta, sum vit fyrst og fremst fara at leggja okkum eftir, sigur Birgir.